## Suzuki sølumet



Við 6.000 seldum bilum í 2003 setti Suzuki nýtt sølumet í Danmark, har teir eru næstmest selda japanska bilmerki. Grand Vitara vøruvognurin er ein av best umtóktu 4x4 í Danmark

*Kelda: Motor Magasinet*

## Øll sita bundin



Formaðurin fyri "Havarikommissionen for Vejtrafikulykker", Svend Krarup Nielsen, hevur skotið upp at ein skipan verður gjørd, soleiðis at bilar ikki kunna koyra, uttan at øll í bilinum eru bundin í trygdarbelti. Í fjør doyðu 463 fólk í ferðsluni á donsku vegunum. Hann metir at minst hundrað av teimum høvdu yvirlivað, um tey sótu bundin.

*Kelda: DR Nyheder Online - Indland*

## Hyundai »ambitiónir«



Hyundai, sum er tann størsta bilverksmiðjan í Suðurkorea, væntar ein metumsetning upp á 156 milliardir krónur í 2004. Eisini hava teir ætlanir um at blíva heimsins 5. største bilframleiðari áðrenn 2010

*Kelda: Motor Magasinet*

# Frits og Heri 30 ár hjá Reyni Service

**Við ársbyrjan høvdu tveir av veteranunum hjá Reyni Service í Hoyvík 30 ára starvsdag. Tað vóru teir báðir Frits Joensen og Heri Guttesen, sum byrjaðu í Rættará 2. januar 1974**

STARVSDAGAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Frits Joensen og Heri Guttesen hava arbeitt hjá Reyni Service í 30 ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Reyni Service er ein gomul fyritøka, ið hevur røtur heilt aftur til 1947, tá Sigird av Reyni (1916-1994) stovnaði fyritøkuna. Tað vísir seg at starvsfólkini støðast væl, og tey eru fleiri, ið hava arbeitt har í mong ár.

2. januar 2004 høvdu tveir av veteranunum í fyritøkuni, Frits Joensen og Heri Guttesen, 30 ára starvsdag.

Frits Joensen, ið er 57 ára gamal, var í handils- og goymslulæru hjá Thomas Dam, og arbeiddi har til hann fekk starv á eykalutagoymsluni hjá Reyni Service í Rættará.

Frits er leiðari á eykalutagoymsluni, og hann hevur verið við til at bygt eina nútímans og væl virkandi eykalutagoymslu upp. Hann hevur eisini arbeitt nógv við marknaðarføring av fyritøkuni.

Heri Guttesen, ið er 47 ára gamal, byrjaði sum 17 ára gamal á eykalutagoymsluni í Rættará 2. januar 1974. Níggju mánaðir seinni fór hann í læru sum bilmekanikari á verkstaðnum. Heri hevur altíð havt sera stóran áhuga fyri bilum, og hann hevur fylgt væl við í mekanisku og tøkniligu menningini av bilunum hesi seinastu 30 árini. Eisini hevur hann fingið góðar umstøður at dagføra sína vitan. Eitt tíðarskeið í 80-unum var Heri verkførari hjá Reyni Service.

Tá Frits og Heri byrjaðu hjá Reyni Service seldi fyritøkan ensku Morris bilarnar. Í 1978 flutti Reyni Service í nýggj hølir í Hoyvík, og í 1980 fingu teir umboð uppá Toyota.

Teir siga báðir at 30 ár er long tíð á sama arbeiðsplássi, men av tí at Reyni Service er gott arbeiðspláss, og fyritøkan er í støðugari menning, hava teir trivist væl.

Hjá Reyni Service starvast umleið 50 fólk, deildin í Klaksvík íroknað.

# Motorsúkklur er teirra fremsta frítíðarítriv



*Magnus Pauli Udbø og Eyðstein Jacobsen við Kawasaki VN-1500 motorsúkklunum framman fyri einum málningi av Ingálvi av Reyni í høllini hjá Reyni Service*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tveir av plátusmiðunum og lakkerarunum hjá Reyni Service, Magnus Pauli Udbø og Eyðstein Jacobsen, hava keypt sær hvør sína stóra Kawasaki motorsúkklu. Teir halda, at tað er alt ov dýrt at skráseta súkklurnar í Føroyum**

MOTORSÚKKLUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Teir elska motorsúkklur, Magnus Pauli Udbø og Eyðstein Jacobsen, sum báðir eru plátusmiðir og lakkerarar hjá Reyni Service.

Teir hava keypt sær hvør sína stóra Kawasaki motorsúkklu brúkta úr Týsklandi gjøgnum ein danskan millumhandlara.

Súkklan hjá Magnus Paula er ein Kawasaki VN-1500 Tourer frá 1998, hon hevur koyrt 33.000 km, meðan tann hjá Eyðsteini er ein Kawasaki VN-1500 Classic frá 1997, ið hevur koyrt 13.000 km.

Motorsúkklur eru teirra fremsta frítíðarítriv, og teir gleða seg til at koyra við teimum í summar. Súkklurnar eru lítið brúktar og síggja út sum nýggjar.

Hóast teir eru sera væl nøgdir við súkklurnar, harmar tað teir, at súkklurnar kosta næstan tríggjar ferðir tað, sum tær eru keyptar tær fyri, tá tollur og avgjøld er goldin í Føroyum.



# Í Føroyum var vanligt, at fólk við breki bert fingu hjálp frá skyldfólki

**- Hevði tú fingið brek av sjúku ella vanlukku, so var revalideringsmøguleikin, at tú kundi hjálpast við at hava eina kiosk ella hýruvogn. Tað vóru ikki skipaði viðurskifti. Í dag er nógv av hesum óhugsandi, segði Leila Solmunde, formaður í Giktafelag Føroya, tá ið virðislønin varð handað Fornminnissavninum**

VIÐURKENNING
*Anna Joensen,*
*praktiknæmingur*



*– Vit eru við at gerast ein meira sjónligur partur í samfelagnum, og tað er tí, at samfelagið er meira tilvitað um, at brek er nakað, sum kann raka okkum øll, sigur Leila Solmunde, formaður í Giktafelag Føroya*

Á samkomuni, tá ið MBF handaði Forminnisavninum virðislønina, segði formaðurin í Giktafelag Føroya, Leila Solmunde, eisini nøkur orð.

Hon vísti á, at sum navnið sigur, er Fornminnissavnið eitt savn, ið hýsir fornminnum.

- At bera brek, er ikki nakað, sum er nýtt; tað hava altíð verið brekað fólk. Men munurin frá fornari tíð og til í dag er stórur.

Leila vísti til bókina, »Søgan um hini«, har rithøvundurin sigur, at tað er á fortíðina, vit byggja framtíðna.

- Heilt frá gamlari tíð máttu fólk bidda. Síðani varð lóggivið um fátækrahjálp í 1708, og nýggjari lóg um fátækrahjálp kom í 1802, sum fólk flest ikki vildu søkja. Vit kenna søguna um Stakkalasjørnuna, sum varð ein óskrivað lóg í Føroyum, har fólk við breki vórðu samanborin við stakklar. Ein farin tíð tíbetur.

Leila segði, at í Føroyum varð vanligt, at brekað fólk bert fingu hjálp frá sínum skyldfólki, og nøkur fá fóru til Dannmarkar at søkja sær hjálp. Hevði tú fingið brek av sjúku ella vanlukku, var revalideringsmøguleikin í miðan av síðstu øld, at tú kundi hjálpast við at hava eina kiosk ella at sleppa at hava hýruvogn.

- Tað vóru ikki skipaði viðurskifti, ið søgdu, at tú hevði rættindi eins og aðrir borgarar. Tað var vanligt, at fólk fingu eyknevni fyri sítt brek.

Hon segði, at í dag er nógv av hesum óhugsandi. Fólk hava rættindi og skyldur mótvegis hvørjum øðrum og samfelagið somuleiðis. Tað vildi verið óhugsandi, at fólk bert fingu innivist og mat, tá ið gongustjørnan, Venus, sást á himli.

– Okkara tilvitan um brekað fólk er økt, tí tey eru vorðin ein sjónligur partur í okkara samfelag. Fyri at gerast meiri sjónligur, er umráðandi, at viðurskifti í samfelagnum eru til staðar.

Leila segði, at Fornminnissavnið er eitt gott dømi um, at fortíð og framtíð møtast. Savnið hýsir nógvum spennandi lutum frá farnari tíð, og í dag er ein nútímans lyft sett upp, og hurðarnar eru upplatnar fyri øllum føroyingum - eisini teimum, sum eru skerd í rørsluni.

– Vit kunnu ímynda okkum, at eitt fólk í koyristóli kom á gátt í síðstu viku at síggja framsýningina. Men tá seinna helvt skuldi síggjast – ja, so var einki at gera, tí trappur eru niður í níðara sýningarhøli. Tú mátti gjøgnum kjallaran og lagurrúmið fyri at koma í niðara framsýningarhølið, sum hýsir teimum spennandi fornlutunum, eitt nú kirkjubøstólunum.

Í røðuni spurdi hon, at nakar kann ímynda sær, at fólk í dag søgdu við tey reyðhærdu, at tey máttu ganga inn gjøgnum kjallaran, – og at tey, sum eru myrk í húðini, kunna ganga gjøgnum aðrar bakdyr.

Og hon svaraði sjálv:

– Nei sjálvandi ikki; tað hevði verið óhugsandi í dag.

Men, segði Leila, at situr tú í koyristóli, er hetta ein heilt vanlig kensla, tí tú rennur teg alt ov ofta í, at ikki slepst inn í ymisk hølir, har framsýningar og almenn tiltøk eru. Tú skalt berast og koyrast afturum. Ein sera óvirðilig og niðurgerandi støða í 2003.

– Vit eru við at gerast ein meira sjónligur partur í samfelagnum, og tað er tí, at samfelagið er meira tilvitað um, at brek er nakað, sum kann raka okkum øll. Vit mugu fáa skipaði viðurskifti við at tryggja alla fysiska atkomu við lóg – og ongantíð ov skjótt.

Hon segði seg vera ógvuliga fegna um, at Fornminnissavnið er gjørt meira tilgongiligt.

– Hetta er ikki bert til gagns fyri tey, sum sita í koyristóli. Eldri fólk eru illa gongd, og ung foreldur við vognum og stólum fáa eisini gagn av hesum. Fólk, sum eru rørslutarnað, ferðast líka nógv sum onnur, og her er atkoma til søvn sera tiltrongd.

Formaðurin í Giktafelag Føroya ynskti at enda Fornminnissavni Føroya bestu eydnu í framtíðini.

– Eg vóni, at henda samkoma og hetta tiltak vil eggja til at skapa betri atkomu aðrastaðni í føroyska samfelagnum – til gagn fyri allar føroyingar, segði Leila Solmunde.

